# Kjak



Bergtóra Høgnadóttir Joensen

## Etikkur og virðing óneyðug, tá talan er um sinnisveik?

Gleðin var ivaleyst stór hjá sálarsjúkum, avvarðandi, áhugafeløgum og starvsfólkum á psykiatriska deplinum í apríl 2008, tá samtykt var at gera íbúðir til sinnisveik í Havn. Greitt er, at stórur tørvur er á bústøðum til fólk, sum eru liðugt viðgjørd á psykiatriska deplinum. Løgtingslógin sigur púra greitt, at talan er um bygging av íbúðum í Tórshavn til sinnisveik – lógin bleiv samtykt fyri smáum trimum árum síðani. Landsstýriskvinnan hevur verið púra kúrr um hesar sera neyðugu íbúðirnar í longri tíð, til vit nú brádliga frætta, at íbúðirnar skulu flytast til Vágarnar.

Sum skilst hevur hvørki rímilig, nøktandi hoyring ella politisk viðgerð verið um málið. Tey, sum av álvara verða rakt av broytingini hevur eingin ómakað sær og latið komið til orðanna. Sinnisbati hevur fingið hoyringsfreist sum er ein vika!!

### Óvirðiligt? Avgjørt

Lat meg undirstrika, at talan er um bústaðir til fólk, sum í mong ár - ja summi í ártíggju - hava búð á einari ótíðarhóskandi sjúkhúsdeild, tí bústaðir til teirra ikki vóru nóg ovaliga raðfestir. Talan er um fólk, sum øll hesi árini hava fingið lummapening heldur enn pensjón. Á nógvar hættir eru tey ikki viðfarin virðiliga. Fleiri teirra hava ivaleyst glett seg til at fáa íbúð í Havn – nærhendis verandi bústaði. Í nærumhvørvinum, har tey eru von at vera og nógv tilboð eru. Men nú sigur landsstýriskvinnan brádliga: gott er, tit flyta til Vágarnar í staðin!

Alt gott um Vágoynna. Sambýlunum, sum eru har, havi eg bert gott at bera. Men flestøll høvdu óivað talað at, um vit høvdu grundstykki í Havn, men brádliga fingu at vita at vit ístaðin fingu grundstykki í Vágum – ella øvugt. Sjálvsagt!

Kenni ikki orsøkina til handfaringina av málinum hjá landsstýriskvinnuni. Tryggja arbeiðspláss í Vágum? Hugsar hon: tá hini kunnu, kann eg eisini...ella hvussu?

### Landspolitikk ella lokalpolitikk

Mong dømi eru um, at landsstýrisfólk uttan himpr, politiska viðgerð ella góðum grundgevingum leggja stovnar í heimstað sín. Ræðir meg, at slíkt er um at gerast siðvenja hjá samgonguni.

Alt skal ikki vera í Havn, men umráðandi er, at onnur atlit verða tikin, enn hvar landsstýrisfólkið hevur traðkað sínar barnaskógvar og fær størstan persónligan ágóða av at leggja stovnin. Tað tænir ikki samfelagnum á nakran hátt - tvørturímóti. Tykist at vera alt ov tilvildarligt og hevur lítið við landspolitikk at gera.

### Rakar meint

Harafturat rakar júst hetta málið serstakliga meint. Í mun til eitt nú Heilsutrygd og brúkaraumboðið snýr hetta seg ikki burturav um starvsfólk og viðskiftafólk. Hetta snýr seg um búfólkini. Fólkini sum skulu búgva har, trívast og hava ein ríkan gerandisdag. Talan er her um heimið hjá fólkum, sum í fleiri førum eru sera viðbrekin.

Undirtøkan fyri uppskotinum var stór. Ein samd trivnaðarnevnd tók undir við uppskotinum. Vit tóku undir við, at íbúðirnar skuldu byggjast í Havn. Góðtaki tískil hvørki handfaringina ella ætlanirnar hjá landsstýriskvinnuni.

### Byggja, heldur enn brenna brýr

Havi hug at skoyta uppí, at grundgevingarnar eg higartil havi hoyrt landsstýriskvinnuna nýta ikki hava sannført meg um, at ætlanirnar eru skilagóðar ella væl undirbygdar. Sum politikarar eiga vit at kýta okkum til tess kveikja og birta vón hjá teimum sum halda gerandisdagin vera serliga truplan. Neistin var kveiktur hjá fleiri við ætlanunum um íbúðirnar í Havn. Seinastu útsøgnirnar hjá landsstýriskvinnuni gera hinvegin uttan iva fólk ótrygg og óttafull. Sjálv hugsi eg: hvat verður tað næsta. Neyvan er tað bara eg sum hugsi tað. Mín vón og áheitan er, at landsstýriskvinnan spyr og lurtar eftir teimum, sum verða ávirkað av ætlanum hennara, og teimum sum hava fakligan førleika at ráðgeva henni. Tey skulu ikki bert hava eina viku at svara. Tey skulu veruliga hoyrast, verða tikin í álvara og hava ávirkan. Tað er framtíð og heim teirra vit viðgera, tískil er sera umráðandi at brúkarar og fakfólk eru við í hesari prosessini.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

## Mótmæli til Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum

Í sambandi við at Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, hevur tikið avgerð um at flyta byggiverkætlanina av íbúðum til sálarsjúk frá Tórshavn til Sandavágs og at menna ein depil í Vágoynni, har sálarsjúk og menningartarnað skulu tengjast saman í eina felagsverkætlan, mótmæla vit hesari verkætlan.

Ein lítil helvt av samlaða fólkatalinum í Føroyum býr í Tórshavn, sum eisini hevur flest tilboð í landinum at bjóða teimum sálarsjúku. Tað eru nógv fleiri tilboð til fólk við sálarsjúku í Tórshavn enn á bygd og sostatt størri møguleiki hjá hesum bólki at fella inn í samfelagið. Stórur fári er fyri at hesin sárbæri bólkur verður stigmatiseraður í smærri plássum og líkindin at fella inn í samfelagið er meira avmarkaður í smærri plássum enn í høvuðsstaðarøkinum.

Sálarsjúk og menningartarnað mugu ikki tengjast saman í ein felagsdepil. Fólk, ið eru sálarsjúk, og fólk við menningartarni koma undir tveir fullkomiliga ymiskar bólkar:

- **»Sinnisbati«** umboðar fólk við »sálarsjúku« (t.d. depression, skizofreni, psykosum, ADHD, angist, fólk við etingarólag v.m.) og avvarðandi.
- **»Javni«** umboðar fólk, sum eru »menningartarnað« (fólk við menningartarni) og avvarðandi.

Sálarsjúk fólk eru ikki menningartarnað.

Vit heita við hesum á Rósu Samuelsen, landsstýriskvinnu í almannamálum, um at broyta avgerðina um at byggja íbúðir til sálarsjúk í Sandavági og sleppa ætlanini at samansjóða menningartarnað og sálarsjúk í einum felagsdepli í Vágoynni. Vit mæla staðiliga til at íbúðirnar verða bygdar í Tórshavn.

**Sinnisbati**
Soffi Egholm
Formaður

**Javni**
Sigrun Warum
Formaður



Zakarias Wang
*Forlagið Stiðin*

## Fólkaatkvøðubókin fæst aftur!

Forlagið Stiðin gav á ólavsøku út bókina Fólkaatkvøðan 14. september 1946. Í hesi bók hevði Zakarias Wang savnað saman allar tær keldur, sum søgdu nakað um ta stórhending, at føroyingar tann 14. september 1946 samtyktu at land okkara skuldi gerast eitt sjálvstøðugt ríki.

Síðani hevur nógv orðaskiftið verið um hesa fólkaatkvøðu, og enn eru Føroyar ikki vorðnar tað, sum føroyingar tá ásettu. Tey yngstu av teimum, sum tá vóru virkin, hava nú ommuog abbabørn, sum lítið vita um hetta undursama summar, har Føroya fólk fekk lagt fyri seg øll sjónarmið, og eftir gjølla at hava hugsað seg um, tók ta avgerð, at best var at loysa frá Danmørk.

Hví gjørdu vit hetta?

Nú ber til hjá øllum at fáa at vita, hvørji argumentini vóru hjá teimum, sum vunnu, at taka hesa avgerð, og hví tey, sum taptu, ikki vildu loysa.

Henda bók vakti so miklan ans, at hon skjótt varð útseld, men nú hevur forlagið prentað hana uppaftur og nú ber aftur til hjá tí uppvaksandi ættarliðinum at fáa at vita hví tey sum livdu í 1946 vóru so djørv.